FØÐINGAR

15. mars fingu Hanna og Jógvan Højbro Jacobsen, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3500 gr.

26. mars fingu Elsa Jógvansdóttir og Esbern Jacobsen, Innan Glyvur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3400 gr.

27. mars fingu Gunnvá Jónsdóttir og Edvard Frederiksen, Miðvágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4000 gr.

27. mars fingu Margret Norðberg og Búgvi Thomsen, Hvalba, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4250 gr.

28. mars fingu Sólrun og Palli Gregersen, Norðragøta, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 2355 gr.

28. mars fingu Ólavur og Angelina Fuglø Sivertsen, Hvannasund, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3925 gr.

28. mars fingu Margreta Dam og Brynjer Gregoriussen, Argir, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3305 gr.

28. mars fingu Oddny Clementsen og Henrik Juul, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

29. mars fingu Shamik og Høgni Johannesen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 50 cm. long og vigaði 2900 gr.

29. mars fingu Laila og Steinbjørn Berg, Søldarfjørður, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3700 gr.

30. mars fingu Selma og Páll Augustinussen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3750 gr.

30. mars fingu Durita Johansen og Jens Hjørleif Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 49 cm. long og vigaði 3500 gr.

31. mars fingu Sigrid Røsvik og Olaf Vestergaard, Hvítanes, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3575 gr.

31. mars fingu Berit Unn Petersen og Kjartan Egholm, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3700 gr.

31. mars fingu Fanny M. Petersen og Kári Mikkelsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4300 gr.

2. apríl fingu Óla Jacob á Sondum Estbú og Vivian Pettersen, Sandur, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3900 gr.

2. apríl fingu Malbjørg Thomsen, Skopun og Merwyn Thomsen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3510 gr.

3. apríl fingu Katrin Erlendsdóttir, Hvalba og Rói Joensen, Vestmanna, ein son. Hann var 48 cm. langur og vigaði 2650 gr.

3. apríl fingu Astrid og Arni Matras, Esbjerg, eina dóttur. Hon var 48 cm. long og vigaði 2190 gr.

3. apríl fingu Sólva og Knút Høgagarð, Toftir, tvíburar – gentur. Onnur var 46 cm. long og vigaði 2215 gr. og hin var 48 cm. long og vigaði 2290 gr.

ANDLÁT

26. mars
Anna Hansen, fødd Dalberg, ættað av Sandi, 62 ár.
Pauli Hermansen, Hósvík, 89 ár.

27. mars
Jonhild Mellemgaard Jacobsen, Klaksvík, 42 ár.

28. mars
Hans Jacob Nielsen, vanliga nevndur Hans Jacob við Kvíggja, Sumba, 76 ár.

29. mars
Kjartan Midjord, fyrrverandi sýslumaður á Sandi, 74 ár.
Ásla Berg, ættað úr Leirvík, búsitandi í Havn, 65 ár.

30. mars
Inge Toftatún, búsitandi í Bergen, 73 ár.

31. mars
Mia Joensen, seymikona í Vestmanna, 85 ár.
Sørina Thomassen, Miðvágur, ættað av Strondum, 86 ár.
Johanna Johannesen, Inni á Fjørð, Vestmanna, 86 ár.

01. apríl
Gustaf Múller, ættaður úr Porkeri, búsitandi í Vági, 81 ár.
Bent Heinesen, ættaður av Sandavági, búsitandi í Ámot í Norra, 61 ár.

02. apríl
Ingibjørg Mørkøre, ættað av Eiði, búsitandi í Havn, 99 ár.
Absalon á Grømma, Klaksvík, 80 ár.

TILTØK

Gudstænastur
1. sunnudag e. páskir
Havnar kirkja: kl. 11 konfirmatión, Bjarni Bæk
Vesturkirkjan: kl. 11, Heri Joensen
Argir: kl. 11, Bergur D. Joensen
Svínoy: kl. 12, altarg., Elsa Funding
Tvøroyri: kl. 11, (útvarpað) Jónsvein Bech
Hósvík: kl. 11, Marjun Bæk
Kollafjørður: kl. 11, Inga Poulsen Dam
Søldarfjørður: kl. 11, Meinhard Bjartalíð
Sørvágur: kl. 12, David Johannesen
Eiði: kl. 11 konfirmatión, Emil Olsen
Funningur: kl. 12, John Myllhamar, trúboðari
Gøta: kl. 11, konfirmatión, Martin R. Jacobsen. *(Frá hesum sunnudegi verður aftur farið kl. 11 í kirkju í Gøtu)*
Árnafjørður: kl. 12, altarg., Niels Pauli Danielsen
Porkeri: kl. 12, konfirmatión, Marianne Telling
Hvalba: kl. 12.30, altarg., v/ konfirmantum
Sandvík: kl. 14, altarg., v/ konfirmantum, Ólavur Rasmussen
Klaksvíkar sjúkrahús: kl. 10, *Árnafjørður:* kl. 12, altarg., *Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
Mikladalur: kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
Christianskirkjan: kl. 11, lestur

Í Hvalbiar kirkju, gongur talvan fyri Sunnudagsskúlablaðið

Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti.
Mána-, týs- og mikukvøldið kl. 20.30 Bønartímin. Øll eru vælkomin.

Adventkirkjan
Í dag kl. 10 Barnabíbliutími og bibliugransking. Evni: Torskildir profetir gjørdir fatiligir. Kl. 11 Gudstænasta, J. V. Danielsen.

Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnukvøldið kl. 17.30 Bønarløta, kl. 18 Møti v/ Ingolf Johannesen úr Sandavági.
Mánakvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman. Allar kvinnur eru vælkomnar.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting (skipað barnaansing). Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Una Næs presti. Evni: 2. Krýnikubók.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.
Týsdagin kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantaveitsla, holdini hjá Bergi Debes Joensen og Hera Joensen.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti.
Mánadagin kl. 17 og 19 Skótamøti.

Ebenezer
Í dag kl. 16.00 og 20.00 halda Ungdómssamfelagsmøtir áfram.
Sunnudagin: kl. 10.00: Breyðbróting, kl. 12.00: Sunnudagsskúli, kl. 17.00: Ungdómssamfelagsmøti, kl. 21.00: Útimøti.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorarbeiði fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Jóhannes Martin Olsen, fyrrverandi fólkatingslimi.
Manskórið syngur.
Mánakvøldið kl. 20 venur Manskórið.
Meinigheitslegan verður í Nesvík 12.-14. apríl, teknin-arlistin liggur frammi í húsinum inntil 10. apríl.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 Landsbøn, kl. 20 Grøðingarmøti v/ Ólavi Jacobsen.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Sverre Bjørghaug úr Noregi, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 16 Samkomufundur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

Hvítusunnusamkoman
Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, kl. 18: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 Sunnudagsskúli, kl. 17 Møti.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Orðsins tænasta við kommunión í Kerit.
Hóskvøldið kl. 20.00 verður Taizé-kvøld (bønarstund við sálmasangi úr Taizé) í bønarúminum hjá Franciskanarsystrunum, Varðagøta 16. Øll eru vælkomin.
Leygardagin kl. 11.30: Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00: Hámessa v/ Wladislaw Zdunek í Mariukirkjuni. Aftan á verður kirkjukaffi.
Sunnudagsskúli kl. 14.00.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin í Hoyvíkar skúla: Kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 17.30: Bøn og kl. 18.00: Møti við skúlaleiðaranum á Bíbilskúlanum Vejen, Sverri Bjønhaug.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti, Uppi á Brekku 3.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti við Magnus Paula Johannesen.
Mánadagin kl. 20 Bønarmøti.
Tlf. andaktin 424 741.

Kollafjarðar Missiónshús
Sunnudagsskúlin verður kl. 14 og møti kl. 18 við Símin og Jónfinn.

Missiónshúsið í Hvalvík
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Árna Jacobsen, Leirvík. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan í Skálafirði
Leygarkvøldið: Opið hús kl. 21.00.
Sunnudagin: Morgunmøti kl. 11 við Paula Høj, barnamøti kl. 11, evangeliskt møti kl. 17 v/ Egil Toftegaard o.fl.
Vælkomin í Kelduna, www.keldan.fo

Lívsins Orð
Í kvøld kl. 20.00 verður opið hús.
Sunnudagin kl. 10.30 møti v/ Símun Jacobsen. Sunnudagin kl. 17.00 evangeliskt møti við sangi og vitnisburði.

Soli Deo Gloria
Leygardagin: kl. 10.00: Bøn, kl. 20.00: Alpha skeið.
Sunnudagin, kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 18.00: Møti v/ Preben Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00: Bønarmøti.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Inger Nørgaard frá Sudanmissiónini. Innsavning til húsið. Aftaná verður drekka og hugnalig samvera.

Missiónshúsið í Gøtu
Sunnudagin kl. 18 Møti við J. S. Myllhamar, trúboðara, innsavning.

Filadelfia, Gøta
Møti sunnukvøldið 8. apríl er flutt til kl. 20.00. Øssur Berghamar og Sangbroður taka lut. Øll eru vælkomin.

Thabor, Fuglafirði
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti og kl. 21 Ungdómsmøti.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin: kl. 14.00: Sunnudagsskúli, kl. 17.30: Lovsang/bønarløta, kl. 18.00: Møti.

Café One Way, Tvøroyri
Leygarkvøldið kl. 21 Møti í café'ini, Gimme og onnur luttaka.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við Albert og Kammu. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Frelsunarherurin, Vágur
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti, Palle Petersen talar.
Mánadagin kl. 20 Heimaforbundið – fyri allar kvinnur.

EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

Tey hildu fast við læru ápostlanna og samfelagið, við breyðbróting-ina og bønirnar
(Ápostlasøgan 2.42)

Onkur hevur sagt, at tað var ommunum í Ruslandi fyri at takka, at kristindómurin ikki doyði út. Hetta er kanska at taka ov rívan til, men týdningin av uppalningini í kristnu trúnni kunnu vit tó valla yvirmeta. Tað var av sonnum einki eindomi, tá ið stóra sálmaskald okkara Mikkjal á Ryggi sum nakað av tí fyrsta mintist, at tað var omman, ið tók hann upp á knæið og har lærdi hann fyrstu bønina. Og munnu ikki flestu føroyingar kenna seg aftur í sanginum hjá Hans Andreasi, har hann sum tilkomin maður minnist aftur á móður sína og barnaárini í Áarstovu. »Trygt legði eg høvur á kodda/ og hon kom og setti seg/ á songarstokkin hjá mær/ Kom, lat meg nú signa teg. So signaði hon meg um ennið/ yvir bringuna risti hon kross/ Legg teg í Harrans hendur/ gev móður tíni ein koss!« Og tað er vist, at vit ikki gerast ríkari tann dag, tá ið mammurnar eru hildnar uppat at signa børn síni og leggja tey í Harrans hendur.

Kristindómur hevur frá fyrsta degi eisini verið læra, og tí er uppalingin í kristnitrúnni lika gomul sum kirkjan sjálv. Elstu lýsingina av fyrsta kirkjuliðinum finna vit í Ápostlasøguni, har sagt verður: »Tey hildu fast við læru ápostlanna og samfelagið, við breyðbróting-ina og bønirnar«. Tað var ikki nóg mikið einafeið at vera komin til trúgv og vera doyptur. Tú mátti eisini fáa kunnleika um, hvat ið hetta hevði at týða fyri teg og lív títt frameftir. Tað var ikki nóg mikið, at tú í dópinum varð gróðursettur í Kristi, tú mátti eisini læra at verða verandi í honum, at liva í honum, soleiðis sum tað verður sagt, hvørja ferð dópur er. Tí skuldu børnini ikki bara doypast, men tey skuldu eisini læra-ast at halda alt tað, ið Jesus hevur boðið okkum.

Tað hevur havt og hevur so ómetaliga stóran týdning, at heim og skúli samstarva á hesum øki, og tað hevur verið okkara lukka, at hetta hevur føroyski skúlin gjørt til henda dag. Tað eru heimini, sum lita skúlanum børn sini til, og tí má skúlin í arbeiði sínum virða tað lívsgrundarlag, sum foreldrini vilja, at børn teirra skulu uppalast í og byggja sítt lív á. Tað má vera samljóð millum heim og skúla, og uppalingin í føroysku mentanini má framvegis setast høgt, skal komandi ættarliðum verða tryggjaður lutur í hesi mentan, sum var andaliga grundarlagið hjá teimum, ið undan eru farin. Eisini tí er uppalingin í kristni, í kristnu siðalæruni og í teimum virðum, sum hon farnu øldirnar hevur givið fólki okkara, lívsnevðugt. Tibetur veit fólk okkara – eisini tey, ið ikki eru limir í fólkakirkjuni – at verða ikki komandi ættarliðini upplærd í kristnu læruni og hvat, ið hon hevur at týða, so skilir uppvaksandi ættarliðið ikki kristna boðskapin og gerst í í stóran mun fremmant fyri egnari mentan og egnum fólkalívi. Og júst tí er tað so umráðandi, at skúlin framvegis er við í upplæringini í kristni, og at vit ikki fara inn á ta undirgangs gotu, sum flestu grannar okkara valdu, tá ið teir tóku burtur úr lógini kravið um, at skúlin skuldi undirvísa í evangelisk-luthersku læruni. Gud signi fólk okkara.

Amen.

Hans Jacob Joensen

TILTØK

Missiónshúsið í Vági
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Onki møti vegna konfirmatión.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

Eysturoyar gongufelag
Spákingartúrur verður í Leirvík sunnudagin 7. apríl. Vit møtast kl. 14.00 við Víkingatoftirnar oman fyri ferjuleguna. Tilmelding á tlf. 211449 ella 449449.

Frá felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánað í Jákupsstovu í J. Patursonargøtu 24 í Havn. Nærri fæst at vita frá Annvør Nielsen tlf. 317261 ella Sólgerð Foldbo, tlf. 422184.

Heilaskaðaráðgeving
Spyr um alt innan heilaskaða. Fyri bæði heilaskadd, avvarðandi og tey, ið arbeiða við aftur-venjing.
Sendi okkum eitt meyl til neozone@neozone.dk
NeuroPlan, Vingetoften 18, DK 2730 Herlev
Tú kanst eisini ringja til: tlf. 4484 2665 (Jón) mobil: 2443 0903 (Jón)
www.neozone.dk

Dagtilhaldið í Vági
Dagtilhaldið er opið týsdag og hósdag frá kl. 15.00-18.00. Øll eru vælkomin.

Dagtilhaldið Fløvin
heldur til í húsinum hjá Kongshavnar Kvinnufelag. Opið er mánadag-friggjadag frá kl. 15.00-18.00. Allir pensionistar eru vælkomnir.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og friggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 212380.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn
tlf. 319630/61655400.

Tilhaldið
í Tórsgotu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-friggjadag kl. 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Mánadagin 8. apríl
kl. 9.45-10.15 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Seyma fýrkantar saman til teppir
kl. 10.15-18 Vit mála
kl. 14-18 Kort- og bobbspæl, telving, dart og onnur spøl. Tilmeld. til døgurðan mikudag tlf. 316491
Týsdagin 9. apríl
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Jóhann R. Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Lívsvirðið, Heri Joensen, prestur.
Mikudagin 10. apríl
kl. 10-13 Matgerð
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur niðan undir Svartafoss
Hósdagin 11. apríl
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen
kl. 14-17 Domini binding
kl. 15-17 Tøvingarhugni í kjallaranum, Ása Hátún & Súsanna í Jákupsstovu
Friggjadagin 12. apríl
kl. 10-15 Opið hús
kl. 15 Brot úr dagbókini hjá Rasmus Andreasen frá Árhusferðini 1909. Flemming Samuelsen.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552.

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Roykfríur fundur í morgun kl. 9-10. Fundur verður í kvøld kl. 17-18 og sunnudagin kl. 11-12.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

ACA
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
Opin roykfríur fundur fyri øll áhugaði er hvønn sunnudag kl. 16.00-17.00, í Mariukirkjuni, Varðagøta 16.

AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn friggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 21.00 og sunnudag kl. 15.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Føroyahúsið í Keypmannahavn
Leygardagin 13. apríl kl. 15 verður barnamøti v/ Randi og Símun Hansen. Aftaná verður ókeypis kaffi, te og køkur. Kl. 19.30 verður filmurin Left Behind sýndur. Ókeypis atgongd. Uml. kl. 22.30 verður lovsongsløta. Kristnastova skipar fyri.
Sunnudagin 14. apríl kl. 17 verður evangel. familjumøti. Á skránni verður felagssangur, sangur, vitnisburðir, tala, søga til børnini v.m. Aftaná verður drekkamunnur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin: mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 – fyri børnum uttan ansing.

Føroya Heimavirkisfelag
Postboks 1209 - 110 Tórshavn.
Teldupostur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst við at ringja til formannin: Nigro Hermansen tlf. 314304 / fartlf. 288304.

LFÚ-skrivstovan
hevur opið týsdag og hósdag millum kl. 11 og 16.
LFÚ-ráðgevingin hevur opið týsdag og hósdag frá kl. 16-18.

LÆKNAVAKTIR

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 6. apríl: Magnus á Stongum, tlf. 423006
Sunnudagin 7. apríl: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

Norðoyggjar:
Læknavaktin tlf. 458888

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

95 ÁR

Mikudagin 10. apríl fyllir Karen Ulsøe Egholm, 95 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni á Hyldevej 7, Høll, 7080 Børkop.

BRÚDLEYP

Leygardagin 13. apríl kl. 10.30 giftast í Sjóvar kirkju Bogi Kallsberg, Klaksvík og Meinhild Jacobsen, Kolbeinagjógv. Kl. 13 verður borðhald í Bygdarhúsinum í Leirvík. Tit, ið vilja hátíðarhalda dagin saman við okkum verða biðin um at siga frá innan 1. apríl á tlf. 447801, 228227 ella 456040.

Leygardagin 27. apríl kl. 14 giftast í Miðvágs kirkju Mariann Nattestad og Birgir av Kák Joensen. Døgurðin verður hildin fyri innbodnum. Tey, ið vilja gleða parið at halda dagin, eru hjartaliga vælkomin til Paulu og Wensel Nattestad kl. 19. Tað verður nátturði og kakuborð.

Leygardagin 11. mai kl. 16 giftast í Sands kirkju Bergitta Thomsen, Skopun og Allan Simonsen, Sandur. Veitslan verður í Samljóð í Skopun kl. 19. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, kunnu ringja á tlf. 361876, 361191 ella 361111 áðrenn 1. mai.

SILVURBRÚDLEYP

Í dag, 6. apríl hava hjúnini Elisabeth og Beðin Christiansen, Tórshavn, silvurbrúdleyp. Opið hús verður frá kl. 15 á Norðurrás 3.

Týsdagin 16. apríl hava Súsanna og Hans Terji Hansen, Søldarfirði, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Bygdarhúsinum í Leirvík 20. apríl kl. 19. Tey, ið vilja gleða parið, verða vinarliga biðin at ringa 441579 ella 253921 innan 8. apríl.

Týsdagin 23. apríl hava Mildrid og Sunnleif Leo, Leirvík silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í bygdarhúsinum í Leirvík 27. apríl kl. 18. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma eru vælkomin at ringja á tlf. 443203 áðrenn 20. apríl.

Týsdagin 30. apríl kunnu hjúnini Sennøva og Karl Arne Thomsen, Tvøroyri, halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 4. mai í Høllini í Trongisvági kl. 19. Tey, ið vilja vera við til at hátíðarhalda henda dagin saman við teimum, verða biðin um at siga frá innan 19. apríl á tlf. 371618.